

# FRÍSKÚLI, FORSKÚLI OG FRÍTÍÐARSTOVA
## – alt á einum staði!

**Vit síggja næmingin sum eina heild og ynskja at menna hann:**
- Í kunnleika
- Sosialt
- Likamliga
- Andaliga

**FNrískúlin Keldan er ein kristin fNrískúli, sum m.a.leggur dent á:**
- Eina góða innskúling í einum forskúla, sum skal fyrireika børnini til at fara í skúla.
- Eitt høgt fakligt støði í øllum lærugreinum
- At gera einstaklinga menningarætlanir
- At brúka fjølbroyttar arbeiðs- og undirvísingarhættir í samband við næmingavirksemi
- At uppbyggja eitt gott sjálvsvirði, sum gevur tryggleika og rúm fyri læring
- At skapa tryggar umstøður í smáum flokkum
- Eitt gott foreldrasamstarv

Møguleiki er at innskriva títt barn í forskúla ella 1. flokk skúlaárið 2010-2011 fram til 1 des. Vinarliga set teg í samband við arbeiðsbólkin fyri frískúlan á tlf. 742500 ella á teldupostadressu jastrid@keldan.fo í samband við innskriving ella ynski at fáa fleiri upplýsingar.

Frískúlin Keldan – eitt annað val!

---

SANGBÓLKURIN Vitin

# Eysturoyingar
## – komið og syngið við!

Sangbólkurin Vitin skipar fyri sangløtu í

# Løkshøll

leygarkvøldið 28. november, kl. 21.00



Á skránni er: felagssangur – kvartettsangur – o.a.
Aftaná verður bjóðað kaffi við onkrum góðum afturvið

Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum. Sálmur 34,9

*Øll eru hjartaliga vælkomin*

---

almannastovan

# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening fyri seinra hálvár 2009 saman við kvittanum fyri goldin barnagjøld ella hjúnafelagagjøld, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 03.12.2009. Kvittanir skulu eisini vísa, til hvønn barna- ella hjúnafelagagjøld eru goldin. Um goldið er til TAKS, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Stuðulin er 50% av goldnum gjøldum, sum eru forfallin innan 01.07.2009. Frá 01.07.2009 er stuðulin 40%.

Sambært lóg um stuðul til uppihaldspening verður stuðulin útgoldin seinast í juni og desembur og verða umsóknir, sum verða móttiknar aftaná 03.12.2009 ikki avgreiddar fyrr enn í juni 2010.

Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barna- ella hjúnafelagagjald frá Ríkisumboðnum ella samsvarandi útlendskum myndugleika sendast inn saman við umsóknini.

Umsóknarbløð kunnu heintast á heimasíðuni www.almannastovan.fo undir teiginum oyðubløð og fáast við at venda sær til økisdeildirnar.

**Økisdeildin í Tórshavn**
Smyrilsvegur 20
100 Tórshavn
tlf. 35 35 10 · fax 35 35 11

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
tlf. 45 72 40 · fax 45 72 41

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
tlf. 47 47 10 · fax 47 47 11

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
tlf. 35 35 60 · fax 35 35 61

---

HÚSALÁNSGRUNNURIN

# Sóknast eftir starvsfólki til málsviðgerð og bókhaldið

Umsøkjarin skal kunna virka og flyta millum avgreiðslu, málsviðgerð og bókhaldið.

**Málsviðgerin**
Umfatar øll viðurskifti í sambandi við lánsumsóknir og samskifti við viðskiftafólk grunnanna, herundir samskifti við aðrar peningastovnar, advokatar og tinglýsing.

**Bókhaldið**
Umfatar allar vanligar bókingar, dagføringar og at eftirkanna kontur

**Avgreiðslan**
Avgreiðslan umfatar í høvuðsheitum:
- Passa vekslaran
- Umsiting av skjalasavninum
- Umsiting av postinum

Nakað av vanligum skrivstovuarbeiði.

**Førleikar**
Tú skalt hava eina viðkomandi útbúgving í skrivstovuyrkinum og innan bókhald, og hava góð evni at samstarva og samskifta, bæði við tínar starvsfelagar og við kundar.

Ein fyrimunur er, at tú hevur kunning innan fíggingarøkið.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið umfatar Húsalánsgrunnin o.a.

**Nærri fæst at vita**
Fyrispurningar um starvið fáast við at venda sær til Páll Poulsen, stjóra tlf. 31 45 83 ella 22 15 62

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 15. desember 2009, og starvið verður sett skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn saman við CV, prógvum og øðrum viðkomandi skjølum, skulu sendast til:

**Húsalánsgrunnurin**
Yviri við Strond 6
Postsmoga 215
110 Tórshavn
Merkt: Starvslýsing

**UM HÚSALÁNSGRUNNIN O.A.** Húsalánsgrunnurin o.a. eru undir eftirliti landsstýrismansins, men verður fyrisitin av einum stýri við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri 4 ár. Húsalánsgrunnurin umsitir eisini Bjálvingarstuðulslánsgrunnin, Íbúðagrunnin og rentustudning til samansparing til sethúsabygging. Húsalánsgrunninum veitir lán til sethúsa- og íbúðabygging og keyp. Bjálvingarstuðulslánsgrunninum veitir stuðulslán til bjálving og orkusparandi tiltøk til fólkapensiónistar sum búgva í egnum húsum ella íbúð. Íbúðaðagrunninum hevur til endamál, at fremja og stuðla kommunum, feløgum og stovnum at útvega og reka íbúðahús eftir serligum reglum. Rentustudningsskipanin hevur til endamál at veita rentustudning úr landskassanum til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging ella keyp og til at keypa grundstykki til húsa- ella íbúðabygging.